# ÚTLAND

TÍÐINDI
ÁRNI JOENSEN
ÁRNI@MAIL.DK
TLF 341800 FAX 341801

STUTT SAGT

## Átøk ímóti fátækradømi

Nývaldi forsetin í Bolivia, Evo Morales, kunngjørdi um vikuskiftið eina stórsligna ætlan, sum skal bøta um fátækradømið í landinum og útvega nógv nýggj arbeiðspláss.

Ætlanin hjá Moreno er at útvega 90.000 nýggj arbeiðspláss um árið tey næstu fimm árini. Í hesum sama tíðarskeiði skulu 100.000 hús og íbúðir byggjast, øll børn skulu læra at lesa og skriva, og tann fátæki parturin av fólkinum skal skerjast úr 35 prosentum í 27 prosent. Ætlanin fer at krevja almennar og privatar íløgur fyri meiri enn 12 milliardir dollarar hetta til 2011.

Carlos Villegas, menningarmálaráðharri, sigur, at tað privata skal gera íløgur í orku- og námsvinnuna, meðan tað almenna skal gera íløgur í heilsuverkið og samferðslukervið. Samstundis skuku smábøndur, handverkarar og smá vinnuvirkir fáa møguleikar at læna pengar fyri lága rentu.

Evo Morales varð valdur til forseta í Bolivia fyri einum hálvum ári síðani, eftir at hann hevði lovað at verja rættindini hjá teimum fátæku og indianska minnilutanum.

## Skotin inni í kirkjuni

Tamilsk bygdafólk har norðuri í Sri Lanka eru skelkað, eftir at vápnaðir hermenn lupu á eina kirkju leygardagin. Álopið kostaði fimm mannalív, og tamilarnir siga, at tað vóru stjórnarhermenn, sum søktu at kirkjuni.

Í Sri Lanka er vanligt, at fólk leita sær skjól í kirkjunum fyri at bjarga sær undan samanstoytum ímillum tamilsku tikararnar og stjórnarherin. Men leygardagin var tað ikki nóg mikið. Stjórnin avsannar, at tað vóru hennara hermenn, sum lupu á kirkjuna, men fleiri eygnavitni hava greitt AP-tíðindastovuni frá, at menninir vóru úr stjórnarherinum. Fólk, sum sluppu livandi frá álopinum siga, at fleiri hundrað fólk vóru í kirkjuni, tá hermenninir herjaðu inn í kirkjuna og fóru at skjóta.

Seinastu tíðina hava fleiri samanbrestir verið ímillum stjórnarherin og tann tamilska uppreistrarherin, sum stríðist fyri at loysa tann tamilska partin frá hinum partinum av landinum. Norðmenn hava roynt semju ímillum partarnar í fleiri ár, men í seinastuni hava fleiri stúrt fyri einum veruligum borgarakríggi í Sri Lanka

## Flýggja frá gosfjalli

Fleiri hundrað fólk tóku í gjár til rýmingar burtur frá gosfjallinum Bulusan í Filipsoyggjunum, eftir at fjallið hevði sent stór øskuskýggj langt upp í luftina.

Jarðfrøðingarnir siga, at fleiri sterkar spreiningar hava verið inni í gosfjallinum, sum er har suðuri á oynni Luzon. Í gjár slongdi fjallið tjúkk øskuskýggj einar tveir kilometrar upp í luftina, og alt lendið rundan um fjallið er hvítt av øsku. Jarðfrøðingarnir siga, at enn er ikki talan um eitt veruligt gos. Teir vænta kortini, at fjallið fer at sleingja meiri øsku upp úr sær, men teir duga ikki at siga, um tað fer at enda við einum veruligum gosi.

Myndugleikarnir í Manila hava givið teimum lokalu myndugleikunum boð um at flyta fólkið burtur frá Bulusan. Í gjár vórðu 42 húski flutt haðani, skrivar NTB.

## Fekk deyðan hval í garnið

Ein fiskimaður í Finnmørkini í Norðurnoregi gjørdist ikki sørt skakkur, tá hann um vikuskiftið fór at hyggja at einum laksagarni, sum hann hevði standandi. Tað vísti seg, at hann hevði fingið fong og ivaleyst tann størsta fongin nakrantíð, men tá hann fór at kanna garnið, sá hann, at ein deyður hvalur hekk í tí.

Løgreglan í Finnmørkini sigur við Aftenposten, at hvalurin var ímillum sjey og níggju metrar langur, men einki verður sagt um, hvat fyri hvalur hetta var. Løgreglan sigur, at hvalurin var ikki deyður av at vera komin í garnið, men at hann var komin rekandi í tað.

Sjóverjan hevur nú togað tann deyða hvalin burtur.

# Ávara Norðurkorea ímóti raket troynd




*Hesa myndina hevur ein fylgisveinur tikið av einari rakettstøð í Norðurkorea*

**USA, Japan og Suðurkorea ávara Norðurkorea ímóti at royna eina rakett, sum eftir øllum at døma kann raka mál í Alaska**

RAKETTROYND
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært amerikonskum keldum eru norðurkoreanar lidnir við at lata brennievni á eina langtberandi rakett, men vánaligt veður hevur forðað teimum at royna hana. Men sambært veðurmonnunum fara líkindini at batna mitt í vikuni.

USA, Japan og Suðurkorea hava boðað norðurkoreansku stjórnini frá, at tey eru harðliga ímóti teirri ætlaðu rakettroyndini.

– Verður royndin kortini framd, fara vit at tosa við amerikanararnar, og síðani fara vit at taka hóskandi stig, segði japanski forsætisráðharrin, Junichiro Koizumi, í gjár. Hann sýtti tó fyri at siga, hvørji stig kunnu koma upp á tal, men japanskir embætismenn hava sagt, at tað kann koma upp á tal at kalla trygdarráðið hjá ST saman at umrøða málið.

Norðurkorea skelkaði umheimin í 1998, tá landið roydni eina langtberandi rakett, sum fór ígjøgnum japanskt loftrúm, áðrenn hon datt niður í Kyrrahavið. Hildið verður, at rakettin, sum norðurkoreanar ætla at royna hesaferð, ber so mikið langt, at hon kann raka mál í Alaska.

Amerikanskir fylgisveinar hava tikið myndir av einari rakettstøð í Hamgyonglandspartinum har norðuri í Norðurkorea, og sambært Reuter vísa myndirnar, at støðin er til reiðar at royna eina rakett.

Summir eygleiðarar halda, at Norðurnorea fer at nýta høvi til at royna ta nýggju rakettina, nú altjóða samfelagið hevur vent eygunum ímóti Iran og tess kjarnorkuætlanum.

# Ísraelskur heryvirmaður njósnaðist ímóti Ísrael

**Omar el-Heib fekk 15 ára fongsul fyri njósning**

NJÓSNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ísraelska ákæruvaldið hevði ákært oberstin Omar el-Heib fyri at hava njósnast fyri tann víðgongda, libanska felagsskapin Hizbollah, og hesum gav rætturin ákæruvaldinum viðhald í.

Í rættarhølinum í Tel Aviv varð Omar el-Heib dømdur 15 ára fongsul. Hann var eisini ákærdur fyri landasvik, men hesum fekk ákæruvaldið ikki viðhald í. Hevði Omar el-Haib eisini verið funnin sekur í landasviki, hevði hann helst fingið lívlanga fongsulsrevsing.

Sambært dóminum gav obersturin Hizbollah upplýsingar um, hvar ísraelskir hermenn vóru, og sum samsýning fekk hann fleiri túsund dollarar umframt rúsevni. Sjálvur heldur el-Heib uppá, at hann er ósekur, og hann leggur herin undir rasismu.

– Eg havi ikki játtað meg sekan, og tað fari eg heldur ongantíð at gera. Eg havi ikki gjørt nakað skeivt. Eg eri ákærdur, tí eg eri arabi, sigur Omar el-Heib sambært BBC.

Ísrael hersetti tíðliga í áttatiárunum ein part av Suðurlibanon, og tey næstu 18 árini vóru javnan samanbrestir millum ísraelskar hermenn og Hizbollah. Fyri seks árum síðani tók Ísrael sínar hermenn úr Libanon.